# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Skal – skal ikki

Freistingin at skriva út eitt skjótt løgtingsval her og nú man vera viknað heilt munandi eftir seinastu veljarakanningina, sum var sera neilig til tveir av samgonguflokkum. Víst rumblar í samgonguni, og markeringarnar gerast alt fleiri, sum dagarnir ganga. Hetta er vanlig føroysk valmentan. Teir tingmenn, ið eru at kalla desperatir eftir afturvali, tveita allan loyalitet og alla skomm fyri borð og koma við útmeldingum av øllum handa slagi. Undir slíkum umstøðum man tað vera meira enn trupult at vera løgmaður og skula nýta kanska alla orkuna til at halda manningini innanborða og samstundis reka politikk.

Tað kunnu tí vera nógvar orsøkir hjá løgmanni at langa til, og vit hava her eisini mælt honum til at taka stigið, so luftin kundi verða reinsað. Hinvegin eigur løgmaður ivaleyst at hugsa seg væl um, og nógv bendir á, at tað er júst hetta hann ger í hesum døgum. Samgongan hevur verið óvanliga produktiv og hevur fingið sera nógv av skafti. Stabil politisk viðurskifti í halvtfjórða ár hava havt ómetaliga jaliga ávirkan á alt samfelagið. Víst hava vit verið atfinningarsom móti løgmanni í hesum teigi, men vit skulu eisini fegin viðganga, at hann hevur sýnt óvanliga gott politiskt hegni at halda saman upp á eina sera fjølbroytta samgongu, og hann hevur fingið meira av skafti enn løgmenn flestir. Hartil er als eingin ivi um, at løgmaður hevur stóra virðing innan sum uttanlands, og hann hevur hildið høvdið kalt í flest øllum truplum umstøðum.

Løgmaður stendur við ótespiligum valkostum. Eitt snarval signalerer dirvi og áræði, men sum veljarakanningin vísti, er vandin fyri at missa valdið sera stórur. Alt bendir á, at tað verður arbeitt hart við alternativari samgongu eftir eitt snarval, og hetta vandasignal kann løgmaður illa ignorera. Spurningurin er tí, um ikki løgmaður hóast allar trupulleikar og vaksandi órógv eigur at halda tørn. Samgonguskútan er komin í eina íðu, men kanska er tað skilabetri at sigla seg út úr íðuni enn at venda skútini í íðuni. Stór mál eru avgreidd, men enn eru framvegis stór og sera týdningarmikil mál at samtykkja, sum ivaleyst kunnu avgreiðast við tí meiriluta, sum hóast alt enn er til staðar á tingi. Hesi mál snúgva seg mest um útbúgvingarøkið og almanna- og heilsuøkini. Talan er um mál, sum bíðað hevur verið eftir í áravís, og sum ikki kunnu bíða longur. Samgongan hevur átikið sær ein stóran og tungan setning, og hon hevur moralska skyldu at fullføra hann. Hartil eigur løgmaður kanska at hava í huga, at javnaðarløgmenn og forsætisráðharrar sjáldan hava vunnið nakað við at skriva út val í ótíð.

**Sosialurin**

## Viðmerking til Roar Olsen



**EYÐGUNN SAMUELSEN**
forkvinna í Demokratia - nevndarlimur í Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag í Útvarp Føroya

Í samrøðu í útvarpinum týsdkvøldið sigur Roar Olsen, at menninir tapa. tí flokkarnir vilja hava kvinnur skulu upp á listan. Tað er so tíðarkrevjandi at fáa kvinnur at stilla upp, ein skal tosa við so nógvar (hevur tosað við eini 40 kvinnur) at tað verður til, at dugnaligir menn ikki verða spurdir. Hetta skilji eg ikki heilt, tí vanligt er at flokkarnir hava fullar valevnislistar óansæð um áleið helvtin av valevnunum er kvinnur ella ei.

Tað er partvíst rætt, at flokkarnir hava ilt við at fáa kvinnulig valevni á listarnar. Allir flokkar kenna hetta, meira ella minni, kanska er trupulleikin størri hjá teimum smáu flokkunum. Spurningurin er, hví er hetta so. Fyri mær at síggja hevur hetta serliga tvær orsøkir, mátin flokkarnir royna at fáa valevnir og tað at politikkurin í dag er so stýrdur av monnum.

**Flokkarnir**
Tað er ein sannroynd, at politisku flokkarnir vanliga fara at leita eftir valevnum í síðstu løtu. Tað er eisini ein sannroynd, at kvinnur seta sera stór krøv til sín sjálvan og tí ofta siga nei, serliga um tær verða bidnar um at stilla upp beint upp undir eitt val. Ongin skal ivast í, at vit í Demokratia vilja arbeiða fyri, at kvinnurnar halda seg meira framat.

Eitt annað, ið gerð seg galdandi er, at flokkarnir, ið alt ov stóran mun lata verða við at koyra tær kvinnur fram, ið hóast alt siga ja. Tað er nógv meira vanligt, at mannligu valevnini koma framat í fjølmiðlunum, enn kvinnurnar. Hetta er ikki altíð so, men tað er nógv meira vanligt at menn-irnir sleppa framat, heldur enn kvinnurnar, tá tað snýr seg um at umboða viðkomandi flokkar í valstríðnum.

Sjálvt um vit í Demokratia vilja heita á allar kvinnur, ið hava áhugan, um at halda seg framat í politikki, so er sannlíkt, at hetta ikki broytist grundleggjandi fyrr enn flokkarnir gera tað, at fáa valevnir, til ein natúrligan part av teirra arbeiði øll 4 árini ímillum valini.

**Politikkurin**
At vit hava eitt løgting, ið er samansett soleiðis at 90% av umboðunum eru menn, ger ikki vánirnar at fáa fleiri kvinnur at fáa áhuga fyri politikki betur. Tað verður á ein hátt sjálvforsterkandi at politikkur í ov stóran mun snýr seg um asfalt og betong. Hesi evnini hava ikki tann stóra áhugan hjá kvinnunum. Tú hoyrir nógvar vælútbúnar og dugnaligar ungar kvinnur siga, at støðið í tinginum er so lágt, at tær ikki hava hug at nýta sína tíð til tað. Hetta er ein álvarsligur trupulleiki fyri fólkaræðið. Eitt annað er arbeiðshátturin í tinginum, hvussu nógvar mammur við børnum, fyri ikki at tala um einligar forsyrgjarar kunnu fáa tingarbeiði og familjulív at hanga saman.

Tað ið skal til, er ein hugburðsbroyting, bæði hjá kvinnunum og flokkunum. Fara flokkarnir veruliga í gongd við eitt miðvíst arbeiði fyri at fáa kvinnur at luttaka í politikki, so eri eg vís í, at hetta, við tíðini, fer at eydnast teimum.

## Gjørdur »kristindómur«

**RICHARD DANIELSEN**

Í sálmi l38,2 lesa vit hetta: " Tí dýrt hevur tú gjørt orð títt, meir enn alt navn títt".

Versið er stutt, men byggir á alla skriftina. Skriftin setir skriftina ógvuliga frammaliga.

Tann ið trýr á Gud má góðtaka skriftirnar. Tær eru orð Harrans til okkara. Bíblian er ein profetabók allan vegin ígjøgnum.

Hetta versið kom aftur til mín nú ein dagin í sambandi við, at menniskju gera krav uppá at vera kristin, men samstundis ikki trúgva tí , sum skriftirnar siga um synd, hóast at bæði nýggja og gamla testamenti eru púra greið hesum viðvíkjandi og kalla tað synd og andstyggiligt.

Hesi menniskju siga at tey trúgva, men hvørjum er tað tey trúgva?

Bíblian er greið hesum viðvíkjandi, gera vit krav uppá at vera tey, sum trúgva á Jesus Kristus, má hetta síggjast í lívi okkara.

Nú tali eg ikki um at falla, ella verða tikin av fótum av onkrari synd. Nei her er talan um tey, sum siga at tey eru Guds børn, men stíga fram og forsvara tað, sum skriftirnar greitt fordøma og siga vera synd. Tað ber ikki til. Tann, sum sigur seg vera ein kristin má góðtaka skriftirnar.

Jesus bygdi á skriftirnar. Í Mark.12,28-29 talar Jesus um tey tvey størstu boðini: "Tú skalt elska Harran Gud tín av øllum hjarta tínum og næsta tín, sum teg sjálvan". Men ansað eftir, hvat hann sigur áðrenn: "Hoyr Ísrael hoyr". Í bók Jeremiasar, sum sigur frá seinastu tíðini áðrenn Judaríkið gekk til grundar, lesa vit aftur og aftur, at Harrin gjøgnum profetin talaði og kallaði á fólkið til umvending. Men aftur og aftur lesa vit hetta: "Tey vildu ikki lurta eftir". Og tey, sum ikki vildu lurta eftir fingu dóm sagdan yvir seg.

Í Jóh. 12,46-48 sigur Jesus hetta:."Tann, sum hoyrir tykkum hoyrir Meg" o.s.fr. Tann, sum trýr á Jesus má akta ápostlarnar og ganga eftir tí læru, sum teir læra.

So, tú sum lesur og eg sum skrivi, vit mugu akta skriftirnar. Tann, sum hoyrir skriftirnar hoyrir Jesus. Einans við at halda okkum til hitt innblásta orð Guds kunnu vit vera standandi ímóti tí ræðuliga falli, sum er fólki okkara fyri í hesum døgum, nú ið bíblian verður sópa av borðinum fyri menniskjans egna uppfunna »kristindómi«.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.